Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Stjóraløn í Posta

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa orsøkina til, at nevndin í almenna partafelagnum Posta hevur givið stjóranum eina lønarhækkan á 184.000 krónur í 2021?
2. Metir landsstýrismaðurin tað vera rætt, at nevndin hevur hækkað lønina hjá stjóranum við 184.000 krónum (12,5 prosentum)?
3. Samsvarar lønin hjá stjóranum í Posta á góðar 1,7 mió. kr. um árið við aðrar stjóralønir í almennum partafeløgum?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvat stjóralønirnar eru í øðrum almennum partafeløgum, sum hoyra undir hansara málsøki?

Viðmerkingar:
Í farnu viku kom fram, at stjóraløn í Posta er hækkað við 184.000 krónum ella 12,5 prosentum frá 2020 til 2021. Nú er samlaða løn 1,7 mió. krónur um árið. Hvørki nevnd ella landsstýrismaður hava givið nakra frágreiðing í miðlunum higartil.

Tað er Føroya fólk, sum eigur Posta, og tí hevur landsstýrismaðurin evstu ábyrgd av, at almenna partafelagið verður rikið á ábyrgdarfullan hátt. Tí verða hesir fyrispurningarnir settir.

Á Løgtingi, 30. mai 2022

Ingilín D. Strøm